# Sum faðir so sonur

**Um dagarnar kom út ein øðrvísi ævisøga enn tær, vit vanliga síggja. Ikki um ein av hesum úrmælingunum, sum tað gongur væl hjá, uttan um ein, hvørs leið gekk hinvegin. Hann rýmdi undan ringum korum heima í Føroyum, men beyð ikki sínum egnu petti betri sømdir í Brasil**

BÓKAÚTGÁVA
*Edvard Joensen*

Søgan um Sofus Severin Strømsten av Oyri, sum endaði í Rio de Janeiro í Brasil, er bersøgin og viðhvørt harður kostur, har einki verður fjalt. Ein øðrvísi søga, har nøvn verða nevnd líka nógv fyri tað ringa sum fyri tað góða.

Sofus Severin Strømsten stakk av heiman í frá undan pápanum, sum hann í bókini lýsir sum eitt bartrog, ið hann als einki gott hevur at bera.

Og kortini verður lesarin skjótt varugur við, at ymiskt er, sum eftir vanligari mannahugsan ikki samsvarar heilt. Sum nú, at Sofus Severing hevur kallað elsta sonin upp eftir pápanum, sum hann annars niðurger sum ein sannan húsbøðil.

Men eftir at hava lisið bókina, situr ein eftir við teirri áskoðan, at høvuðspersónurin er ikki petti mætari sjálvur. Søgan, hann sigur frá um egið lív og levnað, har alt og øll verða sett til síðis fyri hor og drykkjuskap, er ikki við til at lyfta hann petti hægri, enn hann sjálvur setir pápan.

Bókin »Horvin føroyingur«, sum kom út um dagarnar, er um eina ferð til Brasili, har høvundurin saman við myndamanni og beiggja Sofusar Severins fer at hitta rýmda oyrarmannin.

Lagt verður upp til, at leitað verður eftir Sofusi Severini í Rio de Janeiro. Men rættiliga skjótt skilst kortini, at teir hava vitað rættiliga væl, hvar teir skuldu fara. Mesta leitanin skilst hava verið eftir húsunum, hvørs nummar teir kendu.

Mannin finna teir, og vit fáa eina rørandi søgu um tveir brøður, sum hittast aftur eftir 54 ár. Ein søga, sum ikki hevði verið betri, um hon var gjørd. Men hon er púra sonn. Í so máta ein sólksinssøga mitt í allari neyðini, sum týðuliga er høvuðstátturin í bókini.

Tí tað er eingin stuttlig søga, vit fáa. Men hon er spennandi og eg las hana á tamb við tað sama. Kanska gjørdi tað mun, at eg kendi part av henni frammanundan.

Sofus Severin Strømsten greiðir í bókini frá baldruta lívi sínum, sum, alt frá tí hann var smádrongur, hevur verið øðrvísi enn hjá teimum flestu.

Um hvussu hann eins og restin av familjuni varð kúgaður av pápanum, sum bert hugsaði um at koma sær sjálvum fram og vinna pening. Tað bóru hini so kostnaðin av.

Um hvussu hann stakk av frá tí heila, og um hvussu tað gekk honum longri fram á leiðini. Um hvussu illa hann spældi síni kort, tá hann sambært honum sjálvur sat við rættiliga góðari hond.

Men skilliga sæst, at hann kundi sjálvur havt betrað um elendigheitina, um hann var nakað frægari sjálvur. Hann sigur eisini søguna um, hvussu hann sjálvur bar seg at, eftir at hann hevði fingið familju í Brasil. Tað var heldur eingin vøkur søga.

Kortini fáa vit meira enn einaferð borið fram, at hann nú á gamalsaldri er fegin um at kunna siga søguna, so hon kanska kann fáa onkran annan at hugsa seg eitt sindur um.

Grækaris Magnussen er djarvur at geva hesa bókina út. Tað er skjótt at særa onkran, tá ein heil familja soleiðis verður løgd víðopin fyri almenninginum, sum her verður gjørt. Ikki minni djarvur er beiggi Sofusar Severins, sum var við á ferðini og veit, hvat fer at verða givið út.

Bókin er sett upp í pørtum. Byrjar við eini krimisøgu, sum fer yvir í barnaárini hjá Sofusi Severini og soleiðis aftur og fram.

Mitt í tí heila fáa vit eina frásøgn um ferðina hjá teimum trimum, sum fóru til Brasil at hitta mannin. Nakað av brasilskari søgu er eisini í bókini. Og so aftur í dagbókaformi frágreiðing um, hvussu ferðin í Brasil gekk.

Bókin, sum er skrivað í greinastíli - jorunalistiska bakgrundin hjá høvundanum kemur til sjóndar - er løtt at lesa. Stuttir partar, sum eru lidnir, áðrenn tú ført tíð at keða teg. Og nógvar rættiliga góðar myndir eru í bókini. Tær flestu teirra hevur beiggi høvundan, Magnus Magnussen, tikið á ferðini niðri í Brasil.

Bókin »Horvin føroyingur« er umleið 150 blaðsíður og kostar 285, - krónur.

Kann væl verða, at hon verður líka væl móttikin, sum SOS Knúkur, ið Grækaris Magnusen gav út til jóla í fjør, varð. Hon er bygd upp á nakað sama hátt. Er prentað í Danmark og bundin inn í stíva permu.






*Sofus Severin Strømsten er gamal og sjúkramerktur eftir eitt langt og buldrasligt lív*

*Mynd: Magnus Magnussen*

Torbjørn Jacobsen:

## Ein ribbaldur

Í danska blaðnum Politiken 25. november skrivar Jens Lenler um nýggja føroyska tjóðveldismannin á Fólkatingi, Torbjørn Jacobsen.

Torbjørn Jacobsen sigur við Jens Lenler, at hann ætlar sær at verða føroyska umboðið fyri fullveldi, sum situr í Danmark. Torbjørn sigur eisini, helst í spølni, at eftirsum hann hevur verið skipari í 20 ár, so væntar hann, at fólkið fer at gera tað, sum hann sigur. Ætlanin hjá Torbjørn er at halda seg uttanfyri danskan innanríkispolitikk, tí tað líkist ongum, at føroyingar blanda seg uppí donsk viðurskifti.

Eisini er ein viðmerking frá einum fiskimanni inni á Skálafjørðinum. Hann sigur, at tryggasti mátin at fáa føroyskt fullveldi uppá er at senda Torbjørn til Danmarkar. Hann er vísur í, at Torbjørn fer at verða blakaður úr Fólkatingið.

At enda í samrøðuni við danska blaðmannin sigur Torbjørn Jacobsen, at Føroyar vilja verða viðurkendar sum ein tjóð. Hann vil ikki »dumpa« Danmark, men berjast fyri líkarætti.

*-ib*





# Lokalfeløgini mugu takast við

**Nývaldi formaðurin í Sjálvstýrisflokkinum, Eyðun Elttør, vil sleppa burtur úr støðuni, flokkurin er komin í, við at fáa lokalu kreftirnar aktivar aftur í flokksarbeiðinum**

FORMANSSKIFTI
*Edvard Joensen*

Eyðun Elttør, landsstýrismaður, varð týskvøldið valdur til formann í Sjálvstýrisflokkinum. Hann vil sleppa burtur úr vanlukkuligu støðuni, flokkurin er í, við hjálp frá fótfólkinum úti í lokalfeløgunum.

– Vit mugu vera savnandi og leggja tað gamla aftur um, sigur Eyðun Elttør, sum eins og Paulus gamli ásannar, at tað gamla er farið, og alt er vorðið nýtt.

Ella eigur helst at verða nýtt, tekur hann aftur í aftur. Tí hóast vit oftast siga tað og fegin vilja tað, er ringt at gloyma sovorðið, sum tað Sjálvstýrisflokkurin hevur verið ígjøgnum seinnu tíðina.

Men nú er bara eitt at gera, og tað er at koma upp eftir aftur, sigur Eyðun Elttør. Men hann ásannar í sama andadrátti, at tað verður øgiliga tungt, soleiðis sum flokkurin liggur í løtuni.

Uppskriftina hevur hann bara ta einu. Tað er at fara út at fáa lokalfeløgini at hjálpa sær við arbeiðinum. Tað verður eisini strævið, men hann fer at gera tað, sigur hann.

Eyðun Elttør sigur, at tað var í fullari semju á landsnevndarfundinum, at hann tók við sum formaður í Sjálvstýrisflokkinum.

Floksformaðurin, Sámal Petur í Grund, ynskti sjálvur at sleppa frá og skeyt upp, at næstformaðurin, Eyðun Elttør, tók við. Hesum var eingin á fundinum imóti, sigur Eyðun Elttør, og hann tók so uppgávuna á seg.

Í løtuni er bygnaðurin ikki heilt í lagi kortini, tí eingin næstformaður er valdur í staðin fyri Eyðun Elttør. Sambært fyriskriftunum eru bara tveir møguleikar í løtuni. Teir eru Sámal Petur í Grund, landsstýrismaður ella Kári Højgaard, løgtingsmaður. Men hetta fer floksleiðslan at viðgera í næstum, sigur formaðurin.

Landsnevndin skipaði seg við Ronaldi Poulsen í Havn sum formanni, og Jyttu Juul í Funningi sum næstformanni.

Hetta at hann skuldi taka við sum formaður nú, kom í grundini ikki óvart á hann, sigur Eyðun Elttør. Tí longu beint eftir fólkatingsvalið, róði Sámal Petur í Grund fram undir, at hann helst átti at taka seg aftur, nú tað gekk so út av lagi illa við valinum. Serliga hjá honum persónliga.

Politiskt verður eingin broyting annars, sigur Eyðun Elttør. Bæði hann sjálvur og Sámal Pettur í Grund fara at halda fram sum landsstýrismenn, og Kári Højgaard er løgtingsmaður floksins.



*Eyðun Elttør setir álit sítt á lokalfeløgini, sum skulu hjálpa honum at savna Sjálvstýrisflokkin aftur*

# Kristian spyr Sámal Petur

**Kristian Magnussen, løgtingsmaður, setti í gjár Sámali Peturi í Grund, landsstýrismanni, tríggjar fyrispurningar á tingi. Hann spyr millum annað um virksemið hjá Húsalánsgrunninum**

FYRISPURNINGAR
*Edvard Joensen*

Kristian Magnussen, løgtingsmaður, hevur spurt Sámal Petur í Grund, landsstýrismann, um viðurskifti hjá Húsalánsgrunninum, um vanlukkutrygingarlóg og um høvuðsstevnumiðini í løgtingslógaruppskoti hansara um eftirlønarskipan.

Kristian Magnussen vil hava landsstýrismannin at svara uppá, hvussu nógv ognin, sum Húsalánsgrunnurin hevur keypt til bústovn undir Pisuvarða í Havn, hevur kostað grunninum higartil, og hvussu nógv kostnaðurin verður mettur til, áðrenn bygningurin kann brúkast til endamálið, hann er keyptur til.

Eisini vil Kristian Magnussen vita, hvussu nógv búfólk fara at búgva í húsinum, og nær tey sleppa at flyta inn.

Men Kristian Magnussen hevur meira at spyrja um viðvíkjandi Húsalánsgruninum.

Hann vil eisini hava at vita, hvør lógargrein heimilar Húsalánsgrunninum yvirhøvur at keypa fastar ognir, soleiðis sum gjørt verður.

Eisini spyr Kristian Magnussen landsstýrismannin við almanna- og heilsumálum, hvussu tað gongur við arbeiðinum at gera nýggja vanlukkutryggingarlóg.

Tað hevur skund, vísir hann á, tí bæði endurgjaldsábyrgdarlógin og lógin um sjúklingaendurgjald bíða eftir hesari lógini, vísir Kristian Magnussen á.

Og Sámal Petur í Grund fekk eisini tann triðja munnliga fyrispurningin frá Kristiani Magnussen í gjár. Hann var um ta nógv umrøddu pensiónslógina.

Kristian Magnussen spurdi, hvørji høvuðsstevnumiðini í hesi lógini verða, og nær landsstýrismaðurin ætlar at leggja eitt slíkt lógaruppskot fyri tingið.

